Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Abrahamsson Løkin, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Mvg-afturbering til kommunal byggjarí

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin skipanina við mvg-afturbering til kommunal byggjarí, so sum svimjihallir, ítróttarhallir og felagshús vera greiða, gjøgnumskygda og rættvísa?

2. Hvørjar ítøkiligar treytir skulu vera loknar, fyri at kommunal byggjarí kunnu fáa mvg afturborið?

3. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um svimjihallirnar í Havn og Klaksvík hava fingið mvg afturborið í sambandi við bygging, útbygging ella umvæling, og um so er, hvør lógarheimildin var?

4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hví svimjihøllin í Runavík ikki lýkur treytirnar fyri mvg-afturbering?

5. Ætlar landsstýrið at gera uppskot um broytingar í mvg-lógini, sum viðvíkur kommunalari bygging, sum er nevnd omanfyri?

Viðmerkingar:
Gjøgnum tíðina hava fleiri kommunal byggjarí verið umrødd í sambandi við mvg-afturbering. Samstundis hava kommunur í summum førum fingið noktandi svar, hóast talan hevur verið um byggjarí, sum tykist hava sama almenna endamál sum onnur kommunal byggjarí.

Eitt dømi er svimjihøllin í Runavík, sum fekk noktandi svar uppá umsókn um mvg-afturbering. Hetta reisir spurningin um, hvørt skipanin er nóg greið og rættvís, og um allar kommunur verða viðgjørdar eftir somu treytum.

Svimjihøllin í Runavík hevur einasta góðkenda kappingarhyl av sínum slag í Eysturoynni og hevur tí ikki bert staðbundnan týdning fyri Runavíkar kommunu, men eisini almennan og ítróttarligan týdning fyri alla oynna.

Hesin fyrispurningur verður settur fyri at fáa greiðu á, hvørjar treytir eru galdandi fyri mvg-afturbering, hvørjar líknandi kommunalar verkætlanir hava fingið slíka afturbering, og hví svimjihøllin í Runavík ikki verður mett at lúka treytirnar.

Á Løgtingi, 29. mai 2026

Steffan Abrahamsson Løkin